FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Fyriskipan fyri Dekanar á Fróðskaparsetri Føroya:

Dekanstarvið er eitt fulltíðar leiðslustarv, tó so at dekanurin framhaldandi hevur møguleika at fylgja við og menna gransking á sínum fakøki.

## Leiðslutoymi

Rektarin, dekanarnir og fyrisitingarstjórin mynda leiðslutoymið á Fróðskaparsetrinum. Leiðslan skal tryggja gott samskifti og samstarv millum megindeildirnar eins og millum megindeildirnar og miðfyrisitingina.

Dekanar hava vísandi til rektaran yvirskipaðu ábyrgdina av strategiskari planlegging og menning av megindeildunum, herundir menning av tvørfakligum samstarvi og inntøkufíggjaðum virksemi.

Til at fylgja við í gongdini í PhD verkætlanum kunnu dekanar seta PhD nevnd við vísindafólkum, sum gevur dekanunum tilmæli í málum av týdningi fyri PhD tilgongdina og er við til at menna mannagongdir, reglugerðir og sáttmálar fyri PhD lesandi.

## Leiðsla og ábyrgd

Dekanur hevur leiðsluna av megindeild og tryggjar dygd og samanhang millum gransking og útbúgving.

Dekanur hevur vísandi til rektaran ábyrgdina av, at øll gransking, undirvísing og annað virksemi á megindeild, eind v.m. fer fram sambært reglum og málum, sum Fróðskaparsetur Føroya hevur sett sær.

Dekanur umboðar megindeildina úteftir.

Dekanur hevur ábyrgd av starvsfólkaviðurskiftum og trivnaði á megindeildini. Í starvsfólkamálum tryggjar dekanur samsvar við ásetingar frá setursfyrisitingini.

## Fíggjarviðurskifti

Dekanur gevur rektaranum ella tí, ið rektarin útlutar til, tilmæli um fíggjarætlan fyri megindeildina.

Dekanur hevur ábyrgd av fíggjarætlan, sum er tillutað megindeildini.

Dekanur góðkennir verkætlanir við eksternari fígging í samráð við rektaran.

## Námsskipanir

Dekanur góðkennir námsskipanir eftir tilmæli frá settum fakligum bólkum.

Dekanur góðkennir vegleiðarar til serritgerðir (bachelor, master) og til PhD verkætlanir.

## Tilmælismál

Dekanur gevur rektaranum tilmæli um varadekan.

Dekanur gevur rektaranum tilmæli um starvssetanir, starvsloysnir og starvsfarloyvi.

Dekanur gevur rektaranum tilmæli um limir í metingarnevndir fyri akademisk størv.

Dekanur gevur rektaranum tilmæli um próvdómarar.

Dekanur gevur rektaranum tilmæli um andmælingar til verju fyri PhD-heiti.

Dekanur gevur rektaranum tilmæli um setan av fakligum bólkum og nevndum at ráðgeva í málum um útbúgving, gransking og strategi.

Dekanur gevur rektaranum tilmæli um setan av útbúgvingarleiðara fyri útbúgvingarnar á megindeildini.

## Útluting

Dekanur kann útluta ábyrgd av skeiðum ella pørtum av útbúgvingum til ábyrgdarlærarar.

Dekanur kann útluta ábyrgd av starvsstovum, søvnum o.tíl. til medarbeiðarar á megindeildini.